Dagf. 20. januar 2021
HMR J. nr. 21/00216-4

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-069/2020 eftir § 52a í tingskipanini um koronukoppseting til sjúklingar í uttanlandsviðgerð frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu er ætlanin at tryggja, at tey, sum eru stødd uttanlands í sjúkuviðgerð og teirra fylgjarar, verða koppsett? og nær kann roknast við, at hetta verður gjørt?

2. Verða starvsfólkini á sjúklingahotellinum í Keypmannahavn eisini boðin til koppsetingina samstundis

Svar:

Til spurning 1
Tað er ikki nokk til av koppingarevnum, so allar føroyingar kunnu verða koppsettir í senn. Hetta hevur við sær, at neyðugt er at raðfesta, nær teir ymsu bólkarnir fáa tilboð um COVID-19 koppsetingina. Í COVID-19 koppingarætlanini fyri Føroyar er eitt tilmæli um, hvussu ymsu bólkarnir kunnu raðfestast.

Í koppingarætlanini verður mælt til at byrja við at tryggja skipanirnar innan heilsu- og eldraøkið, tí tær eru so viðbreknar. Hetta verður gjørt við at koppseta starvsfólkini í fremstu røð innan hesi øki. Næsta stigið er at fyribyrgja, at gomul og sera heilsuveik verða álvarsliga sjúk ella doyggja av/við korona. So hvørt sum fleiri nøgdir av koppingarevnum koma til Føroyar, fara støðugt fleiri bólkar at fáa tilboð um ókeypis koppseting ímóti COVID-19. Tað verður ásett í kunngerð, hvør bólkur fær tilboð um COVID-19 koppseting. Sum støðan er í løtuni, verður roknað við, at allir føroyingar eru liðugt koppsettir um mánaðarskiftið juni/juli 2021.

Allir sjúklingar, sum verða ávístir til sjúkraviðgerð uttanlands, og ávístu fylgjarar teirra, ið lúka treytirnar í kunngerðini, fáa tilboð um ókeypis koppseting ímóti COVID-19 undan fráferð úr Føroyum.

Í kunngerðini um ókeypis tilboð um koppseting ímóti COVID-19 er ásett, at koppsetingarnar fara fram á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar sjúkrahúsi, Suðuroyar sjúkrahúsi og á koppsetingarstaði í Tórshavn. Harumframt verður stovnsett ein flytfør eind, sum fer at koppseta á t.d. Sandoynni og í Vágoynni. Við støði í ásetingunum í kunngerðini, er tí ikki heimild fyri at koppseta føroyingar, meðan teir eru staddir uttanlands. Henda skipanin er tann sama, sum er galdandi fyri tilboðini um allar aðrar koppsetingar, sum eru ásettar í kunngerðini um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum (kunngerð nr. 151 frá 29. oktober 2020 um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum).

Til spurning 2

Starvsfólk á Sjúklingahotellinum í Keypmannahavn, sum búgva í Danmark, eru fevnd av teimum reglum og raðfestingum, sum eru galdandi fyri koppseting ímóti COVID-19 í Danmark.

Starvsfólkini á Sjúklingahotellinum Tórshavn eru við í koppsetingini, sum Región Hovedstaden skipar fyri. Øll starvsfólkini á Sjúklingahotellinum fingu í boði at fáa koppseting í farnu viku (viku 2). Tey fingu fyrstu koppsetingina ávikavist mikudagin og hósdagin í tí vikuni.

Heilsumálaráðið, 20. januar 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður